## Máltindarnir

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Kvinnur** | | | |
| Simona Dziugyte | Neistin | 158 | (28) |
| Aukse Vysniaskaite | VB | 146 | (41) |
| Nicoleta Radu | Søljan | 143 | (33) |
| Daiva Tuomaite | VB | 126 | (16) |
| Ioana Rápa | VÍF | 121 | (27) |
| Gurið Mortensen | VB | 113 | (6) |
| Katarina Stepanov | Stjørnan | 110 | (20) |
| Melica Ergic | StÍF | 108 | (14) |
| Joan M. Djordjevic | Stjørnan | 104 | (44) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 102 | (21) |
| Irina Radovici | VÍF | 91 | |
| Annika Ljósstein | Stjørnan | 88 | (19) |
| Poula D. Olsen | StÍF | 85 | |
| Nikolina Eyðbjørnsdóttir | VÍF | 84 | |
| Bára S. Klakstein | Stjørnan | 82 | (1) |
| **Menn** | | | |
| Dragisa Stojovic | Neistin | 104 | (3) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 103 | (9) |
| Blagoje Buha | Neistin | 101 | (23) |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 100 | (36) |
| Damir Oros | KÍF | 96 | (29) |
| Ingi Olsen | VÍF | 89 | (23) |
| Áki Mørk | Neistin | 87 | (19) |
| Jacob Jónsson | Kyndil | 75 | |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 74 | |
| Henrik Gerster | H71 | 74 | (29) |
| Høgni Klein | Kyndil | 72 | (2) |
| Gert Hansen | KÍF | 72 | (3) |
| Agnar Joensen | VÍF | 72 | (10) |
| Alexandur Johansen | StÍF | 72 | (27) |
| Regin Petersen | KÍF | 71 | (1) |



*Hóast hann misti stóran part av grundspælinum, er Damir Oros nú av álvara farin at nærkast toppinum av máltindinum*

# Bólkaspælið nærkast

**Seinastu innleiðandi dystirnir í kappingini um Løgmanssteypið verða leiktir komandi vikuskifti**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað verða AB, Sumba, FS Vágar og TB, sum skulu kappast um seinastu plássini í bólkaspælinum.

Hetta stendur greitt eftir dystirnar um vikuskiftið, sum onkursvegna eisini tóktust markera, at nú er fótbólturin um at fara á rull av álvara.

Mest stóðo á hjá ávíka Sumba og TB, sum bæði noyddust út í longda leiktíð, áðrenn tað eydnaðist teimum at tryggja sær víðari luttøkuna.

Í Sumba mundu leirvíkingar eisini iðra seg um, at tað ikki eydnaðist teimum at kom at koma víðari, tí eftir at Norbert hevði lagt Sumba á odda fyri steðgin, var tað LÍF, sum sat á tí mesta. Teir vendu eisini støðuni til 2-1, og stutt fyri leiklok høvdu teir ein meira enn gyltan møguleika, men tá hesin varð misnýttur, kundi Rene Thomsen ístaðin nýta yvirtíðina til at javna. Og í seinasta minuttinum av umdystinum setti Norbert so trumf á, tá hann fyri aðru ferð sendi bóltin í netið til endaliga úrslitið.

Sumba skal komandi vikuskiftið takast við FS Vágar, sum ikki hevði stórvegis trupulleikar av Fram. Her endaði dysturin við 3-0 sigri, og tó at tað bert var tað eina málið á muni fyri steðgin, so var sigurin hjá Vágamonnum ongantíð í vanda.



*Dramatikkurin var øgiligur á Sevmýru, tá grannauppgerð var millum TB og Royn*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

### Drama á Svemýru

Á Tvøroyri var sum vant dramatikkur í luftini, tá Royn vitjaði.

Tað varð TB, sum leikti seg víðari, men tað var ikki fyrr enn eftir umdyst, at sera væl stríðandi Royn-lið, sum at enda bert hevði níggju mans á vøllinum, mátti geva skarvin yvir.

Alt bendi annars rætta vegin, ta´Martin Østerbæk legði heimaliðið á odda, men á Gisli Sveinbjørnsson javnaði í seinna hálvleiki, fór av álvara at standa á. Og tó at Royn eftir hetta fekk tveir leikarar riknar av vøllinum, so megnaðu teir at halda støðuni til langt inn í umdystin. Her eydnaðist at enda Óla Johannesen at beina bóltin í netið eftir hornaspark, og so er TB til reiðar at taka ímóti AB.

Og argjamenn tykjast vera væl fyri í ár. Á heimavølli høvdu teir ongar sum helst trupulleikar móti B71, sum helst væl kundu hugsað sær, at Símun Hansen framvegis leikti fótbólt í barndómsfelagnum. Tí Símun – sum nú spælir í AB – var uttan iva besti leikarin á vøllinum á Argjum leygardagin. Sjálvur skeyt hann tvey mál, og í nógvar aðrar mátar hevði hann eisini høvuðsleiklutin á einum AB-liði, sum tykist væl mannað til at taka lut í oddastríðnum í landskappingini.

### Úrslitini

**AB-B71 4-0 (2-0)**
1-0: Símun Hansen
2-0: Johnny Samuelsen
3-0: Símun Hansen
4-0: Jan Jørgensen

**Sumba-LÍF 3-2 eftir umdyst 2-2 (1-0)**
1-0: Norbert Luschak
1-1: Magni Høgnesen
1-2: Sigfriður Olsen
2-2: Rene Thomsen
3-2: Norbert Luschak

**FSV-Fram 3-0 (1-0)**
1-0: Birgir Joensen
2-0: Jack Johansen
3-0: Tór-Ingar Akselsen

**TB-Royn 2-1 eftir umdyst 1-1 (1-0)**
1-0: Martin Østerbæk
1-1: Gisli Sveinbjørnsson
2-1: Óli Johannesen

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 9 | 8 - 0 - 1 | 578 | 421 | 157 | 27 |
| 2 | VB | 8 | 8 - 0 - 0 | 558 | 414 | 144 | 24 |
| 3 | VÍF | 8 | 5 - 0 - 3 | 517 | 426 | 91 | 19 |
| 4 | Neistin | 7 | 3 - 0 - 4 | 474 | 445 | 29 | 14 |
| 5 | StÍF | 9 | 2 - 0 - 7 | 483 | 564 | -81 | 9 |
| 6 | Søljan | 8 | 2 - 0 - 6 | 383 | 498 | -115 | 6 |
| 7 | Kyndil | 9 | 1 - 0 - 8 | 344 | 569 | -225 | 3 |

**1. Deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Kyndil | 6 | 3 - 1 - 2 | 481 | 449 | 32 | 16 |
| 2 | VÍF | 6 | 4 - 0 - 2 | 449 | 402 | 47 | 14 |
| 3 | Neistin | 6 | 4 - 0 - 2 | 459 | 428 | 31 | 14 |
| 4 | StÍF | 6 | 3 - 0 - 3 | 413 | 390 | 23 | 13 |
| 5 | KÍF | 6 | 2 - 0 - 4 | 428 | 492 | -64 | 7 |
| 6 | H71 | 6 | 1 - 1 - 4 | 396 | 465 | -69 | 5 |

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mjølnir | 18 | 15 - 3 | 48 | 16 | 32 | 22 |
| 2 | TB | 18 | 14 - 4 | 47 | 15 | 32 | 20 |
| 3 | Dráttur | 18 | 10 - 8 | 37 | 29 | 8 | 16 |
| 4 | ÍF | 18 | 7 - 11 | 25 | 36 | -11 | 10 |
| 5 | KÍF | 18 | 7 - 11 | 25 | 44 | -19 | 9 |
| 6 | Fleyr | 18 | 1 - 17 | 11 | 53 | -42 | 1 |

**Meistaradeild, menn**

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 14 | 12 - 2 | 38 | 9 | 29 | 17 |
| 2 | Mjølnir | 14 | 13 - 1 | 39 | 9 | 30 | 19 |
| 3 | SÍ | 15 | 7 - 8 | 27 | 27 | 0 | 10 |
| 4 | Fram | 14 | 2 - 12 | 10 | 37 | -27 | 2 |
| 5 | Fleyr | 13 | 1 - 12 | 5 | 37 | -32 | 2 |




## Leyst starv

Starv sum happadráttarseljari

**í Tórshavn**
(starvið hjá Reyða Krossi Føroya]

er leyst at søkja.

Setanin er galdandi frá 1. juli 2004 at rokna.

Samsýningin er 10% av søluni.

Skrivlig umsókn verður at senda nevndini fyri happadráttin sum skjótast og í seinasta lagi 31. mars 2004.

Nevndin fyri
**Hin Føroyska Happadráttin**
Gundadalsvegur 27
100 Tórshavn

## Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli

### Skeið í »Alesanderteknikki«

Hósdagin 11. mars til sunnudagin 14. mars verður nýtt skeið hildið í »Alexanderteknikki«.
Skeiðið verður hildið í Tórshavnar Musikkskúla á Frúutrøð 1.
**Lærari** er Carsten Møller.
**Prísur** 900,- kr.
**Tilmelding:**
Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli, tlf. 31 77 55.

### Skeið í máling

15. mai til 21. mai heldur Birger Møller skeið í máling.

Skeið fyri nýbyrjarar verður 15. mai og 16. mai.
**Prísur:** 500,- kr.

Skeið í framhald 17.-21. mai.
**Prísur:** 1.000 kr.

**Tilmelding:**
Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli, tlf. 31 77 55.

LANDSVERKFRØÐINGURIN

## Útbjóðing av lastbilaflutningi

Flutningur av gróti, skervi og sandi millum bryggjuna á Langasandi og grótbrotið í Hundsarbotni verður við hesum boðin út alment.

Áhugað kunnu venda sær til LV-skrivstovuna, Tinghúsvegur 5, tlf. 311333, har frágreiðing og treytir verða útflýggjað.

**Landsverkfrøðingurin**

## Starvsfólk

### til barnaansingina í Leirvíkar kommunu

Til Útibarnagarðin hjá Leirvíkar Kommunu verður søkt eftir fólki at byrja 01.mai 2004.

Stovnurin er skipaður í tveimum eindum, onnur eindin við børnum í skúlaaldri úr 1. og 2. flokki og hin eindin við børnum í aldrinum 5 - 7 ár.

Vit søkja eftir fólki, sum dáma væl at vera úti í náttúruni, hava eitt opið sinni og síggja møguleikar fram um mørk.

**Hesi størv skulu setast:**
3 pedagogar í 35 tímar/viku
1 pedagog í 30 tímar/viku
1 hjálparfólk í 40 tímar/viku

Løn samb. sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og FKA.

Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Leirvíkar Kommunu í hendi í seinasta lagi mánadagin 22. mars 2004 kl. 12.00.

Um ikki nóg nógv við pedagogútbúgving søkja, verða hjálparfólk sett fyribils.

Søkt verður eisini eftir 1 vaskifólki í 10 tímar/viku. Løn samb. sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og FKA.

Skrivlig umsókn skal vera Leirvíkar Kommunu í hendi í seinasta lagi mánadagin 22.mars 2004 kl. 12.00.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til leiðaran Annu Djurhuus á telefon 443 125 ella 743 125.

**Leirvíkar Kommuna**
Postrúm 42
520 Leirvík

## Bilar til sølu

**SsangYong Rexton RX290 4WD 7 setur**



prísur 290.000,-

· Árgang 2003 · km 22.500 · Aut. gear · 2,9 Turbo diesel intercooler · Automatiska í- og úrkoblan av 4WD · Centrallás · Fjarstýrdan lykil · Tónaðar rútar · Krók · Lættmetalfelgur við dekkum · Pioneer anlegg við fløguspælara · Vælhildin

Sosialurin 341800

BILVERKSTAÐIÐ
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla · Tlf 31 10 13
Tlf 21 10 13 · Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com

Páll Nielsen, adv.
Eyðhild Skaalum, adv.
Sigmund Poulsen, adv.
Hans Trygvi Teirin, adv.
Tlf. 312171, fax 315874
Teldupostur: advokat@post.olivant.fo
Heimasíða: www.advokatvirkid.fo

ADVOKATVIRKIÐ

## Skrivstovufólk

Vegna ein av kundum okkara við skrivstovu í Tórshavn verður við hesum søkt eftir skrivstovufólki at byrja 1. mai ella eftir nærri avtalu.

**Starvið:** Talan er um heildagsstarv, har høvuðsuppgávurnar verða fyrifallandi skrivstovuarbeiði og bóking. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Advokatvirkið.

**Førleikakrøv:** Skrivstovuútbúgving ella onnur viðkomandi útbúgving umframt royndir frá líknandi arbeiði og kunnleika til Navision bókhaldsskipanina.

**Løn- og setanartreytir:** Sambært S & K sáttmálanum og nærri avtalu partanna millum.

**Umsóknarfreist:** Umsóknir við avrit av próvskjølum og møguligum viðmælum skulu sendast Advokatvirkinum, Postsmoga 85, FO-110 í seinasta lagi mikudagin 7. apríl 2004.

**Advokatvirkið**
Skansavegur 1
tlf. 312171 · telefax 315874
teldupostadressa: advokat@post.olivant.fo

## Stuðulsfólk

Søkt verður eftir einum stuðulspedagogi/hjálpara til 13 ára gamlan drong í Klaksvík at byrja 1. apríl 2004.

Arbeiðið hjá stuðlinum er í samstarvi við drongin og stuðlsráðgevan at stuðla dronginum í at fáa ein innihaldsríkan dag.

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna og er fyribils játtað til 1. februar 2005.

Ynskiligt er at tann ið settur verður, hevur hóskandi útbúgving ella royndir.

Setanin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til jóruna Niclasen, stuðuslráðgeva ella Súsonnu Gaard, sosialráðgeva.

Umsóknir við møguligum avritum av prógvi vera at senda til:

**Barnaverndarnevndina**
Klaksvíkar Kommuna
postboks 2 · FO-700 Klaksvík

í seinasta lagi 22. mars 2004.

Sosialurin
www.sosialurin.fo